Sjúkrarøktin á vegamóti:

Etisku mørkini fyri viðgerð og røkt verða flutt

Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar ger á almennari ráðstevnu í Norðurlandahúsinum vart við, at felagið nú hevur 15 ár á baki. Skráin fyri ráðstevnuna er fjølbroytt við eitt nú útlendskum fyrilestrarhaldarum og luttøku av føroyskum myndugleikum við pallborðið

Almenna ráðstevnan hjá Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, sum verður í Norðurlandahúsinum, byrjar við almennari gudstænastu í Dómkirkjuni fríggjamorgunin, 10. oktober, kl. 10

RÁÐSTEVNA
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Fríggjadagin og leygardagin, 10. og 11. oktober, skipar Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar fyri almennari ráðstevnu í Norðurlandahúsinum.

Heitið á ráðstevnuni er "Sjúkrarøktin á vegamóti", og endamálið við stevnuni er at gera vart við 15 ára føðingardagin hjá felagnum, samstundis sum ljós verður varpað á sjúkrarøktina.

Røktin á vegamóti

Felagið sigur, at bæði fakligar og fakfelagsligar broytingar hava verið hesi 15 árini, síðan Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar varð stovnað.

- Vit hava valt at lýsa sjúkrarøktina á vegamóti við atliti til nútíðarsamfelagið, har brúkarin hevur møguleika at fáa meira innlit og harvið størri ávirkan á sína heilsu og sjúku.

Felagið vísir á, at nýggja tøknin eisini ger, at etisku mørkini fyri viðgerð og røkt verða flutt.

Fjølbroytt ráðstevna

Skráin fyri ráðstevnuna er fjølbroytt, og fyrilestrarhaldarar verða bæði úr Íslandi, Noregi, Svøríki og Føroyum.

Skipað verður eisini fyri pallborði, har heilsumálaráðharrin, almannaráðharrin, mentamálaráðharrin, rektarin á Sjúkrarøktafrøðiskúla Føroya, sjúkrarøktarstjórin á Landssjúkrahúsinum, forkvinnan í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og leiðarin fyri Heimarøktini verða við.

Ráðstevnan byrjar við almennari gudstænastu í Dómkirkjuni, fríggjamorgunin, 10. oktober, kl. 10.

Bilar

Nr. 191 • hósdagur • 9. oktober 2003 • 77. árg.

Innan er Audi A3 nú meira sportligur við t.d. alu-look luftdysum og smartari og praktiskari gardanboks
Mynd: Álvur Haraldsen

Nýggjur og væl gjørdur Audi A3

Audi A3 1,6 Attraction við 102 hk
Mynd: Álvur Haraldsen

Audi A3, ið fyrstu ferð kom á marknaðin í 1996, er nú avloystur av einum nýggjum A3. Bilurin er, sum man kann vænta tað av einum Audi, gjøgnumførdur og væl gjørdur heilt niður í smálutir

BILAR
Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo

Tá vit tosa um pappír, er A3 størri enn A4, men hjá Audi er A3 minni enn A4.

Audi A3 er ein bilur sum ikki beinleiðis kappast í prísi við aðrar bilar í somu stødd men heldur í gjøgnumførdum kvaliteti, har alt so at siga er perfekt, heilt niður í smálutir.

Hóast nýggi Audi A3 líkist sær sjálvum, er talan um ein størri bil við meira sportligum designi og koyrieginleikum. Undirvognurin er soleiðis gjørdur at bilurin hevur sportligar koyrieginleikar og betri stabilitet í svingum. Hetta merkist væl, við tað at bilurin koyrir sum ein dreymur undir øllum umstøðum bæði á góðum vegi og á ósløttum, tað er eins og at koyra ein munandi størri bil. A3 hevur "multilink-bakaksil" og møguleika fyri 4x4 Quattro í dýrari útgávunum.

Í grundútgávuni hevur A3 ein 1,6 litur bensinmotor við 102 hk, síðan fæst hann eisini við einum 2,0 litur FSI bensinmotori við 150 hk og einum 3,2 litur einum TDI dieselmotori við 140 hk.

Hóast A3 líkist sær sjálvum, er talan um ein størri bil
Mynd: Álvur Haraldsen

Attraction, Ambition og Ambiente

Innan er A3 nú meira sportligur við sportsetrum og alu-look luftdysum á instrumentborðinum og eini smartari og praktiskari gardanboks. Tað fellur í eyguni hvussu væl gjørt alt er. Sum nakað nýtt kemur A3 nú við elektromekaniskum róðurgreiðum og servostýring, sum tillagar seg ferðina. Fyri at lætta um hjá teimum ferðandi á baksetrunum at sleppa inn og út, hevur forsetrið eina "Easy-entry" funktión, har stólaryggurin og setrið automatiskt fara so langt fram, at lætt er at koma inn og út .

A3 fæst í trimum útgávum hvat útgerð viðvíkur, grundútgávan er Attraction, sportútgávan er Ambition og Ambiente er luksus-útgávan. Aktivar nakkapútur, airbag framman, í síðunum og høvuðairbag til tey ferðandi framman og aftan, 16" hjól og manuelt klimaanlegg er standard. Hann er eisini útgjørdur við elektroniskum stabilitetsprogrammi (ESP) og bremsuassistenti.

Í fyrstu atløgu verður A3 bert gjørdur við trimum hurðum, men síðst í 2004 kemur hann eisini við fimm hurðum.

Audi

Audi A3 1,6 Attraction

Motorurin	1,6 litur 4 syl. besnin 102 hk
0-100 km/t	11,9 sek.
Bensinnýtsla	13,9 - 14,3 km/l (blandað koyring)
Dekkstødd	205/55-16
Stødd og vekt	
Longd	420,3 cm
Breidd	176,5 cm
Hædd	142,1 cm
Eginvekt	1205 kg
Viðførisrúm	350 litrar
Prísur	kr. 222.000,-
Søluumboð	Bilasølan v. Øssur Johannesen Vegurin Langi FO-188 Hoyvík Tel. 315354 www.audi-vw.net